# Løgtingið samt um útlát

**Á tíðindafundi í morgun legði Annika Olsen, landsstýriskvinna í umhvørvismálum, eitt uppskot frá øllum flokkum á tingi um útlát av veðurlagsgassum fraa**

SEMJA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Umboð fyri flestu flokkar á tingi vóru við á tíðindafundinum í morgun. Tó bar ikki til hjá Kára P. Højgaard og Alfred Olsen at vera við, tí teir vóru staddir uttanlands*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tað er ikki á hvørjum degi, at eitt samt løgting leggur eitt uppskot fram. Men tað hendir so nú.

Á tíðindafundi í morgun almannakunngjørdi Annika Olsen, landsstýriskvinna í umhvørvismálum, fram »Uppskot til samtyktar um at skerja útlátið av veðurlagsgassum«.

Hon segði, at tað var ikki nóg mikið at seta sær eitt mál, tað er eisini neyðugt at fremja tað í verki (sitat: Djengis Khan).

- Hetta er fyrsta veruliga stigið á veðurlagsøkinum, sum Føroyar taka, sigur landsstýriskvinnan.

Hon segði, at við hesm átaka vit okkum eina altjóða bindina at skerja útlátið av veðurlagsgassum 20% innan 2020, við støði í 1995.

- Hetta er ikki bert ein politisk semja í Løgtinginum. Hetta er eisini ein semja í landsstýrinum, millum kommunurnar og alt Føroya fólk. Hetta er stutt sagt ein tjóðarsemja, sigur Annika Olsen.

Sambært landsstýriskvinnuni eru tað bert trý lond í ES – Danmark, Írland og Luxemburg – sum hava mál á sama støði sum Føroyar. Hini 24 ES-londini seta sær lægri mál.

Meira verður gjørt við uppskotið um minking av veðurlagsgassum í blaðnum í morgin.

